## Føroya Studentaskúli og HF-skeið

Treytað av góðkenning frá játtandi mynduleikum verða frá 1. august 2004 at rokna **2–4** føst størv leys at søkja sum adjunktur/lektorur við faksamanseting ætlað til lærugreinaraðið í studentaskúlum og HF-skeiðum. Størvini eru treytað av faksamansetingini hjá umsøkjarunum. Hesar lærugreinir hava serligan áhuga:

**teldufrøði, heimspeki, danskt, geografi, støddfrøði, samfelagsfrøði, spanskt, religión og evning**

Umsøkjarar eiga at tilskila, hvørjar aðrar lærugreinir innan studentaskúla- og HF-skipanina teir hava undirvísingarførleika í. Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august 2004 - í viku 33. Nýsett starvsfólk skulu sambært føroyskari kunngerð um námsfrøði hava staðið námsfrøðiliga útbúgving í seinasta lagi tvey ár eftir setanardagin.

Í sambandi við starvsetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir.

Gjørt verður vart við tveyára sáttmálan, ætlaður umsøkjarum við vantandi føroyskum málførleika og vantandi kunnleika um føroysk samfelagsviðurskifti. Tað vil siga, at umsøkjarin verður settur í tíðaravmarkað starv fyri tvey ár. Skúlin rindar kostnaðin hjá umsøkjaranum fyri flyting og ferð fram og aftur millum verandi bústað og Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Skúlin endurrindar í mesta lagi 30.000 kr. fyri flyti- og ferðaútreiðslur hvønn vegin - gevið gætur - upphæddin er skattskyldug. Ætlar umsøkjarin at halda fram í starvinum eftir tveyáraskeiðið, skal umsøkjarin søkja starvið av nýggjum á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar. Áhugaðir kunnu venda sær til skúlan.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo

Umsókn á oyðublaði frá YF ella frá GL verður stílað til Føroya Landsstýri, Mentamálaráðið, Tórshavn, men verður sent til:

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið,**
**att.: Mads Winther, rektari, Hoydalar,**
**FO - 188 Hoyvík, Føroyar**

í seinasta lagi 11. mai 2004.

Avrit av prótvtøkuskjølum ella úrskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður fara fram miðskeiðis í mai.

# Sosialurin
-tað loysir seg

## Føroya Studentaskúli og HF-skeið

Frá 1. august 2004 at rokna verða **7–9** ársvikariat leys at søkja í hesum lærugreinum:

**donskum, enskum, , alisfrøði, føroyskum, søgu, ítrótti, støddfrøði, samfelagsfrøði, týskum, film/sjónvarpi, latíni, tónleiki og sponskum**

treytað av faksamansetingini hjá umsøkjarunum. Umsøkjarar eiga at gera vart við, hvørjar aðrar lærugreinir teir hava undirvísingarførleika í. Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august í 2004 - í viku 33.

Í sambandi við starvsetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir.

Umsøkjarar kunnu fá meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo

Umsókn á oyðublaði frá YF ella GL verður stílað til Føroya Landsstýri, Mentamálaráðið, Tórshavn, men verður sent til:

**Føroya Studentaskúla og HF-skeið,**
**att.: Mads Winther, rektari ,Hoydalar,**
**FO - 188 Hoyvík, Føroyar**

í seinasta lagi 11. mai 2004.

Avrit av próvtøkuskjølum ella úrskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsókn-ini. Setanarsamrøður fara fram miðskeiðis í mai.

# Gallarí Jinx

Anja Hentze

Málningaframsýning í mai

tel 317101 · jinx@jinx.fo

## Skrivstovulærlingur søkist

Kundi tú hugsað tær eina framtíð innan skrivstovuyrkið?

Vit hava brúk fyri einum skrivstovulærlingi (m/k).

**Vit kunnu bjóða tær:**

- Eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu, har tú gerst partur av einum góðum toymi, og har arbeiðsandin er av teim bestu
- Tryggar arbeiðsumstøður
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning

Tú mást hava HH ella FHS prógv.

Lærutíðin er ávíkavist 2 ella 3 ár.

Tú mást vera fryntlig/-ur, samstarvsáhugað/-ur, ágrýtin og til reiðar at taka við nýggjum lærdómi og ikki vera bangin fyri at taka eina hjálpandi hond í tá á stendur. Til tíðir kann vera sera nógv at gera.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til okkara og tosa við Jan Danielsen, stjóra.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við prógvum og ummælum í seinasta lagi 11. mai 2004.

**pf Klement Petersen**

Tlf. +298 447560 · Fax +298 448460
e-mail: jandan@klementpetersen.fo

*Pf. Klement Petersen er ein fyritøka í støðugari menning, sum í løtuni hevur 9 fólk í starvi. Vit selja í høvuðsheitum tilfar til byggivinnuna og til hús, so sum køkar, hvitvørur, tak, gólv o.m.a.*

# VM-hingsten
## Kjarni fra Tyrevoldsdal

**Toppen i avl**

Søn af super-Orri fra Þufu

Sind 8,5
Tölt 8,5
Pas 8,5

Bygning 7,93
Ridning 8,26
Total 8,12

BLUP 119

NU FROSTSÆD TIL INSEMINERING



## Stutteri Tyrevoldsdal
INFO: www.joras.dk/kjarni

## Arbeiðshandskar
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

**ADC-Heilsølan** spf
Lárvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo



## Fólkafundur 1. mai á Doktaragrund

Leygardagin 1. mai kl. 17.00 verður fólkafundur á Doktaragrund. Á skránni verða røður, felagssangur og tónleikur.

**Røðarar verða:**
Annlis Bjarkhamar, lærari
Marianna Debes Dahl, rithøvundur
Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður
Vígdis Johannesen, fakfelagskvinna.

Eftir fundin verður Tjóðveldiskafé í Vertshúskjallaranum.

Møti fjølment.

**Tjóðveldisflokkurin**

*klipp og goym*

# Fyrstafloks seyðahegn

**50m X 90cm**
**6 tráðað**
**Yvir og undirtráður 3mm**
**Millumtráður 2,5mm**
**Meskavídd**
**B. 15cm H. 14cm til H. 22cm**
**Galvanisering 240g/m2**

# Einans kr. 375,-

**Fa. H.J. Michelsen. Handan Á 6**
**tlf. 31 44 14 - 21 44 14**

Til handilin við Landavegin verður søkt eftir fyrikomandi og røskum

## krambafólki

til skiftandi vaktir. Uml. 30 tímar/viku
Ring ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Annbritt.

**HJÁ GUNLEIVI**

Tlf. 59 51 60 ella 31 21 61

## Skrivstovuhølir

í miðbýnum til leigu.
Uml. 150 m².

**Tlf. 315438**

# Koyrikort?

Nýggj teoriskeið byrja
**mánadagin 3. mai**
kl. 17.30 til persónbil
kl. 19.30 til lastbil, trailara og buss
og **týsdagin 4. mai**
kl. 19.30 til motorsúkklu

**FØRARASETRIÐ**
KOYRISKÚLI

Stanley A. Olsen, koyrilærari, tel 21 10 99 • 21 10 96
John A. Christiansen, koyrilærari, tel 21 47 75

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

## Avloysari

**fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi**

Søkt verður eftir avloysara til kunningarstovuna í Vági fyri tíðarskeiðið 7. juni 2004 til 1. januar 2005.

**Setanartreytir:**
Talan er um fulltíðarstarv.
Starvið er lønt samsvarandi sáttmala millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Heidi Kilgour tlf. 374342 ella 228726.

Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skal verða Vágs Kommunu í hendi í seinasta lagi 24. mai 2004.

Umsóknin skal sendast til :

**Vágs kommunu**
FO-900 Vágur
Viðm. Avloysari

## Almannastovan

## Nýtt telefonnummar

Økisdeildin í Eysturoy hevur fingið nýtt telefon- og faxnummar

**Telefon 474710 Fax 474711**

**Almannastovan**

## Bókavørður

Á Føroya landsbókasavni er starv sum bókavørður leyst at seta 1. juni 2004 ella skjótast gjørligt.
Til starvið krevst útbúgving sum bókavørður.

Tann, ið settur verður, skal taka lut í øllum vanligum bókavarðaarbeiði.

Talan er um 3/4 starv og verður lønt í bólki VI sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við prósvkjølum verða at senda Føroya landsbókasavni í seinasta lagi 17. mai 2004.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Duritu Joensen, konst. landsbókavørð, á tlf. 311626.

*27. apríl 2004*

**Føroya landsbókasavn**
Postsmoga 61
110 Tórshavn

## Til foreldur at børnum í Runavíkar Kommunuskúla

## Uppstillingarfundur
**til skúlastýrisvalið 25. mai 2004**

**Mikukvøldið 5. mai kl. 20.00** verður fundur í fimleikahøllini í skúlanum á Glyvrum.

**Skrá:**
- kunning um valið
- kunning um virksemið í skúlastýrinum

**Møguleiki verður**
- at seta spurningar og
- at gera uppstillingarlistar

Møtið fjølment!

**Valnevndin fyri Runavíkar Kommunuskúla**

## Runavíkar Kommunuskúli

## Skúlastýrisval

Vallistin til skúlastýrisvalið tann 25. mai 2004 liggur frammi á kommuskrivstovuni frá 30. apríl til 18. mai 2004.

Fólk, sum ikki eru á vallistanum, og sum hava valrætt og valbæri, skulu venda sær til skúlan í seinasta lagi 18. mai 2004 við undirskrivaðari váttan fyri at koma á vallistan.

**Valnevndin fyri Runavíkar Kommunuskúla**